KÍF-Tjaldur 26-29 (15-11):

Tjaldur órógvar oddin

Eftir sigurin á kollfirðingum eru runavíkingar nú bert trý stig frá bronsuplássinum, men kollfirðingar hanga framvegis í

HONDBÓLTUR – MENN
Jákup Mørk

Útlendsku leikararnir eiga sín stóra lut í framgongdini hjá Tjaldri. Ikki minst er Dragan Stojovic fallin skjótt til á liðnum

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað tykist vera ein farin tíð, tá Tjaldur var fast tilhoyr í botninum í fremstu hondbóltsrøðini. Soleiðis hevur stutta søgan hjá hondbóltinum í Runavík annars verið, síðani navnabroytingin fór fram fyri nøkrum árum síðani.

Í fjør sóust av og á nakrir glottar, tó at tann neyðugi stabiliteturin ikki var til staðar, men í ár hevur veruliga bragdað. Eftir eina heldur trilvandi byrjan, er ferð veruliga komin á stigasavnanina, og leygardagin var so ein møguleiki at toga seg enn longur uppeftir, tá leiðin gekk til Vestmanna at dystast móti kollfirðingum.

Skiftandi hálvleikir

Eftir fyrra hálvleik var tó ikki líkt til, at gestirnir skuldu fáa nakað heim aftur við sær til Runavíkar. Eftir eina heldur javna byrjan, kom verulig ferð á heimaliðið seinastu 10 minuttirnar undan steðginum.

Óla Christian Djurhuus sýndi hesa løtuna rættiligt stórspæl í málinum, so tað kundi gera akkurát tað sama, hvussu runavíkingar royndu. Lagið á leikandi venjaranum, Durica Tomic, var eisini í topp, og hóast málini frá hansara hon ikki vóru tey mestu, so átti hann næst seinastu hondina á stórum pørtum av kollfjarðarálopunum.

Hetta kundi líkst avgerandi løtuni í dystinum, og hevði helst eisini verið tað, um gestirnir ikki fingu hálvleikssteðgin at fáa alt í rættlag aftur.

Tjaldur var nevnliga fullkomuliga broytt, nú teir komu út aftur til seinna hálvleik. Teir løgdu nógv meira fyri í verjuni, soleiðis at uppgávan hjá Dejan Lacoe í málinum ikki gjørdist púrasta vónleys, og spakuliga fingu teir soleiðis tak á dystinum.

At byrja við tóku teir seg ikki so nógv inn á kollfirðingarnar, men brádliga tók at bragda. Tað var sum um byrjanin til hetta var reyða kortið, sum Jens Martin Knudsen fekk, eftir triðju útvísingina. Kollfirðingar fingu brotskast, sum teir misnýttu, og so fóru undirmannaðu gestirnir ígongd. Í undirtali skutu teir tvey mál á rað, og so helmaðu teir ikki í.

Við skjótum álopsspæli tægaðu teir KÍF-verjuna somikið sundur, og tað var ikki at undrast á, at Óla Christian fleiri ferðir kendi seg bæði væl og virðiliga seldan av viðleikarunum, tá hesir ikki vóru nóg skjótir at koma í verjustøðu.

Í einum lopi leyp Tjaldur frá at vera aftan fyri við fimm málum til at vera tvey frammanfyri, og hóast heimaliðið royndi at svara aftur, so var hetta vónleyst.

Nýggir tónar

Við sigrinum er Tjaldur nú av álvara farin at nærkast bronsuplássinum, sum hoyvíkingarnir framvegis sita á. Hetta eru helst søtir tónar í oyrunum á runavíkingunum, og megna teir at byggja víðari á góðu gongdina, tá farið verður undir endaspælið, eru heiðursmerki kanska ikki heilt óhugsandi.

Tað veldst tó rættiliga nógv um, í hvussu stórum álvara hondbólturin verður fyrsta umfari, at teir duttu eitt pláss niður á talvuni, tó at allar súður enn ikki eru syftar hjá teimum. Tá stigini verða býtt í helvt, er framvegis ikki so langt upp til bronsuna, at teir skulu gloyma alt um hetta, men útgangsstøði versnaði í øllum førum eitt stig, og so man tað ivaleyst vera steinur oman á byrðu, at stinni málverji teirra fekk reytt kort í seinastu sekundunum, tá hann í frustratión sparkaði bóltin langt av leið.

Dysturin í tølum

KÍF-Tjaldur 26-29 (15-11)

Málskjúttar:
KÍF: Durica Tomic 6(1), Jákup Dam 5, Regin Petersen 4, Kristian Madsen 3, Iljan Topic 3, Eddie Joensen 3, Petur M. Poulsen 2
Tjaldur: Mortan Hansen 9(1), Hartvig Joensen 7(2), Sverri Justinussen 5(1), Dragisa Stojovic 5, Jens Martin Knudsen 2, Zoran Sarcevic 1
Brotskøst: KÍF 2, Tjaldur 5
Útvísingar: KÍF 5, Tjaldur 4
Diskvalifikatión: KÍF 1 (beinleiðis reytt)
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen & Justines Justinussen. Tó at talan til tíðir var um ein rættiliga rótutan dyst, so høvdu teir alla tíðina gott tak á.

Kyndil-VB 25-26 (22-22)(11-8):

VB smoygdi sær við

Kyndil var um reppi at endurtaka sigurin á VB í fjórðingsfinaluni, men mátti tó evstu løtu boyggja seg

COCA-COLA KAPPINGIN – KVINNUR
Jákup Mørk

Eina viku eftir, at tær brádliga vundu burtur úr VB, hevði Kyndil aftur vitjan úr Vági. Hesa ferð var talan um fjórðingsfinalu í steypakappingini, og sjálvandi vóru vónirnar hjá Kyndli góðar.

VB hevur als ikki verið sannførandi í seinastuni, og eftir fleiri keðilig tap í landskappingini, hevði steypakappingin tí nógv at siga, soleiðis at okkurt gott kann fáast burtur úr árinum kortini.

Líktist endurtøku

Tað var tó leingi líkt til, at tað skuldi eydanast Kyndli at endurtaka sigurin á VB, tí eftir eina javna byrjan, so var tað Kyndil, sum var á odda. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki vunnu tær seg fýra mál fram um gestirnar, og síðani var bara at halda fast um hesa.

VB royndi tó at stríðast, og tær fingu minkað um munin, men leingi var líkt til, at so skuldi tað heldur ikki gerast til meira, tí heimaliðið var alla tíðina eitt ella tvey mál frammanfyri. Ikki fyrr enn seinasta málið í vanligu leiktíðini varð skotið, eydnaðiast VB at koma upp á javnt, soleiðis at tær fingu tvær ferðir fimm minuttir eyka at spæla í.

Her var tó eisini líkt til, at tað skuldi gerast Kyndil, men í seinna hálvleiki av longdu leiktíðini bragdaði endiliga. Við teimum báðum seinastu málunum í dystinum smoygdi VB sær framum, og hava tær framvegis møguleikan at koma í steypafinaluna triðija árið á rað.

Hjá Kyndli mundi hetta vera beiskur biti, nú tær tykjast at hava funnið rætta spælið framaftur. Ikki minst tí hetta er annað árið á rað, at tær tapa tepurt í fjórðingsfinaluni.

Tað skerst tó ikki burtur, at seinastu dystirnir hava gjørt hondbóltsspælið meira hugaligt hjá teimum grønu, og so er spurningurin bara, hvussu tær fáa størstu gleðina av hesum í endaspælinum.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Kyndil: Annika Ljósstein 8(5), Lotte Sørensen 7(2), Anha Johannesen 5, Palma Petersen 3, Ann Hansen 1, Rakul Joensen 1
VB: Gabriella Fekete 9(3), Gurið Mortensen 7, Sólrun Krosslá 6, Jensia Petersen 1, Durita Rouch 1, Eyðbritt Krosslá 1, Regina Radó 1
Brotskøst: Kyndil 8, VB 5
Útvísingar: Kyndil 3, VB 2
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg & Ragnar Simonsen

Við teimum báðum seinastu málunum í longdu leiktíðini vann VB sær fyri fyrstu ferð í dystinum fram um Kyndil

VÍF-Neistin 23-19 (11-7):

So er nærum fult

VÍF restar nú bert ein dyst í at hava fult stigatal fyri grundspælið. Sunnudagin kundi Neistin ikki gera stórvegis við heimaliðið, tó at sigurin ikki var so tryggur í tølum

HONDBÓLTUR – KVINNUR
Jákup Mørk

Tó at sigurin ikki var so sannførandi í tølum, so var ongan tíð nakar ivi um, at VÍF var hitt betra liðið sunnudagin

Mynd: Álvur Haraldsen

Sum vant var VÍF stórfavorittur, tá tær sunnudagin spældu heimadyst. Hesa ferð móti Neistanum. Gaman í var talan um dyst móti liðnum, sum í løtuni er á triðja plássinum í kappingini, men føroyska kappingin er nú bara soleiðis, at VÍF so avgjørt er í einum flokki fyri seg.

Dovislig byrjan

Fyrstu løtuna var tó ikki so nógv, sum bendi á, at talan skuldi vera um nakran stóran styrkismun. Neistaliðið hevði gott tak á VÍF. Tær stríddust manniliga í verjuni, og í álopinum eydnaðist teimum tríggjar ferðir á rað at spæla Gunnleyg Berg leysa inni á strikuni, soleiðis at brotskast spurdist burturúr.

Spakuliga kom VÍF tó betri við, og miðjan hálvleikin byrjaðu tær so at draga frá mótstøðuni.

Ikki minst tóktist Sóleu Mikkelsen at vera sera væl fyri, og saman við Ioanu stóð hon fyri nærum øllum málunum hjá VÍF hendan dagin. Júst hetta at hava somikið sterkar einstaklingar, er eisini ein av stóru styrkjunum hjá VÍF.

Serstakliga í fyrra hálvleiki høvdu tær ilt við at fáa nakra veruliga ferð á spælið, men tað kostar koritni einki, tá spælarar so kunnu taka málið í egnar hendur.

Í seinna hálvleiki var skjótt greitt, at her var ikki so øgiliga nógv at tosa um. VÍF bara økti um leiðsluna, og líka mikið, hvussu Neistin so enn royndi, so rendu tær seg inn í antin verjuna ella sum altíð stór spælandi Manuelu Stan í VÍF málinum.

At sigurin so kortini ikki gjørdist nakað serliga stórur í tølum, komst av, at VÍF kundi taka sær av løttum seinastu løtuna av dystinum. 10 minuttir fyri leiklok var støðan annars 21-12 til VÍF, men Neistin slapp so at pynta nakað væl um hesa løtuna, men í vanda var sigurin hjá VÍF so ongantíð.

Fult hús

Við sigrinum restar bert ein dystur í hjá VÍF, fyri at tær annað árið á rað kunnu fara í endaspælið við fullum stigatali. Einasti dysturin, sum restar, er útidysturin móti Sóljuni, og tað ber illa til at ímynda sær, at hesin ikki eisini skal geva fulla úrtøku.

Hjá Neistanum er ikki so nógv annað at gera, enn at lata hendan dystin fara framvið. Tær eru framvegis á triðja plássinum, og her harðnaði kappingin eftir VB sigurin á Stjørnuni. Einki er at ivast í, at Neistin ætlar sær at halda fast um hendan sessin, og tær hava møguleika at styrkja um støðuna, tá VB kemur á vitjan í seinasta dystinum í grundspælinum.

Dysturin í tølum

VÍF-Neistin 23-19 (11-7):

Málskjúttar:
VÍF: Sóley Mikkelsen 7(2), Ioana Rápa 7(1), Nicoleta Radu 6(1), Barbara á Rógvu 1, Fríða Marjunardóttir 1(1), Jacklin Durhuus 1
Neistin: Katrin á Neystabø 6(3), Mildrid Jacobsen 4, Súna Mørk 3(1), Susan Brockie 2, Gunnleyg Bert 2, Kára á Dunga 1, Annika Thomsen 1
Brotskøst: VÍF 9, Neistin 11
Útvísingar: VÍF 4, Neistin 6
Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trúgvi Mortensen. hHildu eina hampuliga harða linju gjøgnum allan dystin.